

*Anna situr spent og bíðar, til Kjøtkrókur letur henni pakkan…*



*…og Niels Áki er so errin, tí nú ræðist hann ikki jólamannin longur!*



*Jóhan Kári og Niels Áki pakka spentir upp jólagávurnar frá Kjøtkróki…*




*…Ester fekk m. a. filmin um Kular Røtur. Álvur, babba, øvundar ikki sørt, men tá hann var lítil, tá ræddiast hann jólamannin, men tað ger Ester als ikki*

# Ung vitja eldri á jólum

**Tað fløvar óivað hjørtuni, tá børn úr vøggustovum ella barnagørðum støkka inn á gólvið á ellisheimum og eldrasambýlum. Stovnurin Eikilund í Vági vitjaði 14. desember á eldrasamýlinum í Vági**

**Jólímynd**
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



At tey gomlu eru gloymd á jólum í Føroyum er kanska ikki beinleiðis rætt. Men lívsins gongd er, at tá ellið tyngir, so er tað ellisheim ella eldrasambýli, ið gerst karmur um lívið. Og óivað kundi verið tættari millum vitjanirnar hjá summum.

Og tá er gott at fáa vitjan av komandi ættarliðum. Nýggjum, ungum kreftum. Teimum, ið eiga framtíðina. Og so hevur tað ikki altíð stóran týdning, um hetta er familja. Børn eru fitt og tað fløvar gomlu hjørtuni, tá børnini koma á vitjan og framføra onkran jólaleik. Og tað er tíbetur alt vanligari við slíkum vitjanum, ið - um nakað - er ein ímynd av jólunum um næstrakærleikanum.

Tann 14. desember vitjaðu børn úr barnagarðinum Eikilund í Vági á eldrasambýlinum í Vági. Har framførdu tey einglaleik og gleðin var stór, tá tey smáu førdu fram og annars hugnaðu sær saman við teimum gomlu. Og sjálvandi vóru eisini langabbar og langommur millum áskoðararnar.




Tøkk

Vit vilja á hendan hátt takka fyri stórfingna móttøku, og tær nógvu góðu heilsaninar tann 29. oktober tá M/S Jógvan Norði kom til Toftir.

Takk til hornblástur, kórsang, røður, og allar tær vøkru blómur og gávur.

Gleðilig jól, og Harrans signing í komandi ári.

**Heilsan**
**Jógvan og Hákun**